**Fra:** Anita Fuglø <anita@kaf.fo> **På vegne af** Kommunala arbeiðsgevarafelagið **Skjal F10**
**Sendt:** 15. november 2019 13:22
**Til:** Almannamálaráðið <amr@amr.fo>
**Emne:** Lógaruppskot til hoyringar - pensjónspakkin

Góðan dagin,

Vísandi til niðanfyristandandi broytingar í løgtingslógini um almannapensjónir (pensjónspakkan) hevur Kommunala Arbeiðsgevarafelagið tær viðmerkingar, at tað er óheppið at broyta eitt so umfatandi lógarverk frá eini samgongu til aðra. Landsstýrið eigur at finna breiðar semjur viðv. hesum týdningarmikla máli. Haraftrat er lógaruppskotið/lógaruppskotini trupul at gjøgnumskoða, serliga tí at lógarbroytingar verða framdar í fleiri lógum um somu tíð – lógir, sum í hvør sínum lagi hava eina ávirka á samlaða pensjónspakkan.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið stuðlar kortini endamálinum í lógini at hækka tøku inntøkuna hjá fólkapensjonistum – og at tað í størri mun enn í dag skal verða møguligt hjá starvsfólkum at niðurlaga sítt arbeiði fram móti fólkapensjónsaldri, uttan at hettar ávirkar skattingina av samlaðu pensjónini eins hart og áður. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið tekur kortini undir við hoyringssvarinum hjá Kommunufelagnum viðv. ávirkanini, sum pensjónspakkin hevur á kommunalu kassarnar.

Vinarliga

Anita Fuglø, leiðari


Kommunala
Arbeiðsgevarafelagið

R.C. Effersøesgøta 26
FO - 100 Tórshavn

Tlf.: + 298 226339
Mail: anita@kaf.fo
Homepage: www.kaf.fo


Góðan dagin,

Við hesum verður sent til hoyringar

1. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. (lækking av mótrokning)
2. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum (Hækking av grundupphædd og lækking av frádráttarfríari inntøkuupphædd)
3. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Skattafrádráttur á kr. 6.000 um árið til fólkapensjónistar)

Hoyringsfreistin er ásett til 15. november 2019 kl. 15.00 og verður at senda til amr@amr.fo.